# Dreymaspøl: Nýggj fløga hjá Hans Jacob Kollslíð og Kára Sverrisson

Hans Jacob Kollslíð og Kári Sverrisson geva í hesum døgum út fløguna "Dreymaspøl". Á fløguni eru 11 sangir og eitt instrumentalt lag. Løgini hava Hans Jacob og Kári gjørt. Tekstirnir eru yrkingar hjá Hans Jacob Kollslíð og Christiani Matras, og yrkingar, ið stava frá sonevnda T'ang tíðarskeiðinum í Kina fyri eini 1200 árum síðani. T'ang tíðarskeiðið verður eisini nevnt "gulløldin" innan kinverska yrking. Kinversku yrkjararnir, ið eru umboðaðir á "Dreymaspølum", eru Li Po (701-762), Wang Wei (701-761), Chang Hu (8. til 9. øld), Tu Fu (712-770) og Po Chü-I (772-846). Yrkingarnar eru tiknar úr bókini "Eystanduni", ið kom út í 1976, og sum var eitt úrval av týðingum hjá H. D. Joensen.

Tónleikarar á fløguni eru Hans Jacob Kollslíð, ið syngur og spælir kassagittar og el-gittar, Kári Sverrisson, ið syngur og spælir kassagittar, moog, tambora og fiól, Jens L. Thomsen, ið spælir el-bass og moog, Mikael Blak, ið spælir kontrabass og bandleysan el-bass, Eyðun Lamhauge, ið spælir harmoniku, Óli Olsen, ið spælir rhodes, flygil og kirkjuurgu, Bass Njai, ið spælir ásláttur og Brandur Jacobsen, ið spælir trummur.

Fløgan er tikin upp í RMS-studio í Saltangará, Mentanarhúsinum í Fuglafirði, Vesturkirkjuni í Havn og aðrastaðni í Føroyum. Fyrstu upptøkurnar gjørdu Regin Toftegaard og Agnar Lamhauge miðskeiðis í nítiárunum. Nýggjaru upptøkurnar gjørdu Jens L. Thomsen, ið eisini ljóðblandaði fløguna, og Kári Sverrisson. Finnur Hansen mastraði. Málningar á forsíðu og aðrastaðni í húsanum málaði Beinta Hansen. Justin Philbrow og Hans Jacob Kollslíð settu húsan saman. Í húsanum eru enskar týðingar av yrkingunum, ið allar eru á føroyskum máli. Fløgan er prentað í Týsklandi og tað er Tutl, ið gevur fløguna út.














